FRÁFARINGARROYND
FÓLKASKÚLANS

MAI 2006

# STØDDFRØÐI

# GREIÐSLU-
# ROKNING

4 TÍMAR

## 1 Fartelefon



**Fartelefon** **3099 kr**



**Bluetooth Headset Wep 150**
**825 kr**



**Prentari** **1179 kr**

Drós keypti sær eina fartelefon og ymiskt annað, ið hoyrir eini fartelefon til. Hon keypti fartelefon, Bluetooth Headset Wep 150 og ein tráðleysan prentara til fartelefonina.

**a** Hvussu nógv kostaði hetta henni?

Pætur vildi heldur hava eina bíligari fartelefon. Hann sá eina, ið hevði kostað 1999 kr, og sum nú var niðursett til 1599 kr.

**b** Hvussu nógv var hon niðursett?

**c** Hvussu nógv prosent var hon niðursett?

## 2 Telesamskifti

Talvan høgrumegin vísir, hvussu vøksturin á telesamskiftinum hevur verið tey seinastu árini.

**a** Hvar heldur tú, at vøksturin hevur verið størstur hesi árini?

**b** Hvussu nógv prosent var vøksturin á fartelefonhaldum frá 2003 til 2004?

**c** Ger eina farmynd, ið lýsir gongdina hjá hesum trimum: fastnetshald, fartelefonhald og internethald.
(1 cm á y-ásinum = 2000 hald)

| Ár | Fastnets-hald | Fartelefon-hald Gsm | Internet-hald |
|---|---|---|---|
| 1990 | 22.376 | 0 | 0 |
| 1991 | 23.716 | 0 | 0 |
| 1992 | 23.741 | 0 | 0 |
| 1993 | 23.256 | 0 | 0 |
| 1994 | 22.637 | 0 | 0 |
| 1995 | 22.246 | 0 | 0 |
| 1996 | 22.856 | 0 | 400 |
| 1997 | 23.557 | 0 | 1.000 |
| 1998 | 24.032 | 431 | 2.400 |
| 1999 | 24.851 | 5.106 | 4.847 |
| 2000 | 24.952 | 12.849 | 6.419 |
| 2001 | 25.471 | 22.796 | 8.642 |
| 2002 | 24.408 | 31.476 | 11.172 |
| 2003 | 24.292 | 36.787 | 11.458 |
| 2004 | 23.958 | 40.262 | 12.199 |

## 3 Vídd og rúmd

Úti í urtagarðinum hjá Drós og teimum hava tey gjørt eitt blómubeð. Tað hevur skap sum tveir sirklar inni í hvør øðrum. Í tann innara løgdu tey mold, og ímillum báðar sirklarnar løgdu tey betongsteinar.




Radius í tí innara sirklinum er 1,50 m, og radius í tí ytra sirklinum er 2,25 m.

**a** Hvussu stór er víddin á tí innara sirklinum, sum tey løgdu mold á?

**b** Hvussu stór er víddin á økinum ímillum báðar sirklarnar, sum tey løgdu betongsteinar á?

Grannin hjá Drós og teimum gjørdi eitt líknandi blómubeð. Víddin, sum tey løgdu betongsteinar á, var 7,3 $m^2$.

Av tí at neyðugt var at skera fleiri steinar sundur fyri at fáa teir at liggja snøgt ímillum sirklarnar, fór eitt sindur til spillis. Tey máttu tí keypa fleiri betongsteinar enn til víddina á økinum. Tey keyptu 5% meira enn til víddina á økinum, sum tey skuldu leggja betongsteinarnar á.

**c** Hvussu nógvar fermetrar av betongsteinum máttu tey keypa?

Betongsteinarnir vóru 6 cm tjúkkir

**d** Hvussu nógv rúmaðu allir betongsteinarnir?

Steinarnir eru gjørdir úr betongi. Evnisnøgdin á betonginum er 2,5 g/$cm^3$.

**e** Hvussu nógv vigaðu betongsteinarnir tilsamans?

## 4 Geometri og algebra




**a** Neyvtekna ΔABC. Hæddin $\mathbf{h_c}$ er 5,5 cm, og miðlinjan $\mathbf{m_c}$ er 6 cm.

**b** Loys líkningina: $(2x + 3)(2x - 3) - 4x \cdot (x - 2) = 7$

**c** Umstytt framsøgnina: $\frac{4}{2a} + \frac{a}{2} - \frac{a^2 + a}{2a}$

**d** Brúka leiðarit og loys líkningina: $x^2 + 2x - 3 = 0$

## 5 Írlandsferð

Drós var saman við foreldrunum í Írlandi á páskum.

Tey flugu við Atlantsflog til Aberdeen og haðani við Ryanair til Dublin.

Ferðin við Atlantsflog fram og aftur kostaði 1750 kr fyri hvønn. Aftrat skuldu tey tilsamans gjalda 1911 kr í skatti og 150 kr í tænastugjaldi.

Ferðin við Ryanair fram og aftur kostaði 89 £ tilsamans.




| |
|---|
| Kursurin á GBP (enskum pundum £) er 1094,2.<br><br>Kursurin á EUR (eurum ) er 746,1. |

**a** Hvussu nógvar krónur kostaðu flogferðirnar tilsamans?

Í Írlandi brúka tey EUR (eurur), og í Norðurírlandi brúka tey GBP (ensk pund, £).

Drós sá eina troyggju í Dublin, sum kostaði 46 EUR.

**b** Hvussu nógv er tað í £ í Belfast?

Tey koyrdu í leigubili úr Dublin til Belfast, tað eru 166 km. Tað tók teimum 2 tímar og 15 minuttir.

**c** Hvør var miðalferðin?

## 6 Hagfrøði

Talvan høgrumegin vísir, hvussu nógv kg av frukt ein ávísur handil seldi teir 27 gerandisdagarnar í mars 2006.

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 76 | 79 | 75 | 80 | 77 | 78 | 80 | 78 | 78 |
| 78 | 77 | 80 | 76 | 79 | 79 | 75 | 77 | 76 |
| 77 | 76 | 78 | 77 | 78 | 76 | 78 | 79 | 77 |

**a** Ger eina tíðføristalvu við uppteljing, tíðføri, tídd og samantaldari tídd.

**b** Hvussu nógv seldi handilin í miðal um dagin?

| kg | Uppteljing | Tíðføri t(x) | Tídd f(x) | Samantald tídd T(x) |
|---|---|---|---|---|
| 75 | | | | |
| 76 | | | | |
| | | | | |

**c** Tekna eina sirkulmynd, sum vísir prosentbýtið av seldari frukt.